## DAGSINS MEINING

# Atlantsflog – privatiserast ella á útlendksar hendur?

Stórtíðindi vóur at frætta mikumorgunin, tá sagt varð, at Atlantic Airways skal privatiserast partvíst. Almennu Føroyar hava fingið at vita, at ein nevnd skal virðismeta allar vinnuligu ognir landsins. Orsøkin er hon, at hesar skulu møguliga seljast privatum, heilt ella partvíst.

Men einki er frætt um, at henda nevnd er farin til verka, tíansheldur er liðug við arbeiði sítt. Tí kom tað heldur dátt vit, at tað fyrsta, sum skal seljast - ella partvíst privatiserast - er føroyska flogfelagið, sum hevur tryggjað, at vit hóast alt hava lutfalsliga bíligar flogseðlar í dag.

Vit eru greið yvir, at flogfeløg leggja saman ella gera aliansur. Í hesi gongd hevur tað víst seg, at altjóða kappingin hevur havt við sær, at tey smáu flogfeløgini klára seg ikki, uttan at tey hava onkra góða nisju at dúva uppá.

So er spurningurin, um nisjan her í Norðuratlantshavi er ein nóg góð og stór nisja hjá Atlantic Airways, ella um føroyska flogfelagið er ov seint á sjóarfallinum at fáa sær ein samstarvsfelaga ella medognara.

Atlantic Airways kappast ímóti Mærsk Air, sum veksur í vavi, og sum hevur gjørt samstarvsavtalu við risan innan flogferðslu á okkara leiðum, SAS. Tí liggur næst fyri at spyrja, hví Atlantic ikki hevur gjørt eina avtalu við t. d. SAS ella okkurt líknandi flogfelag á okkara leiðum?

Nú verður sagt, at partabrøv kanska skulu bjóðast út til nýtekning, m.a. fyri at fáa eitt flogfelag upp í. Harafturat skal kapitalgrundarlagið styrkjast .

Tað er óivað neyðugt at styrkja kapitalgrundarlagi, men so er spurningurin, hví skulu vit hava útlendingar upp í føroyska flogfelagið, samstundis sum landsstýrið legði dent á, at vit skulu hava eina føroyska loysn, tá tað snýr seg um bjargingar- og veitingartyrluna? Til hesa tænastuna fingu hvørki útlendingar ella Flogfelag Føroya høvi at bjóða!!!

Flestu føroyingar eru samdir um, at vit eiga at varðveita meirilutan í okkara føroyska flogfelag, og tí er at vóna, at hetta tiltakið ikki er tikið, tí tað sendur so illa til fíggjarliga hjá føroyska flogfelagnum, at neyðugt er við eini innspræning, t.d. frá útlendskum flogfelag.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Kristian á Dul fimti




Stjórin hjá fyritøkuni P/F Maria Poulsen, Kristian á Dul er vorðin fimti ár og er sostatt rættuliga komin í vaksnamannaliðið. Sum stjóri á hesi kendu og álítandi rør og sanitetsfyritøku, so hevur hann við rættuliga nógv fólk at gera í gerandisdegnum. Hann tingast við spent ungfólk, sum júst fara at setast í búgv. Hann tingast um kranarnir, hvussu teir skulu síggja út, so ella so út og um baðikarið skal vera grønt, gult, reytt ella okkurt heilt annað. Og hann hevur eisini við tey meira tilkomnu at gera, tey sum bygdu fyri eini 25-30 árum síðan. Teirra ørindi eru ofta av eitt sindur meira keðiligum slag. Sentralhitarørini eru nú tærd og vatnrørini eru heil innan, so tað bert drippar úr krananum. Og tunga uppsparingin, sum stendur og nørist í peningastovnunum, og sum er vorðin sjálvt innihaldið í lívinum hjá mongum, minkar í stórum, nú rørarbeiðið skal gerast av nýggjum.

Kristian er ein álvarsamur og dámligur maður og hann hevur verið í fyritøkuni síðan einaferð seinast í sekstiárunum. Dagliga er hann umgyrdur av rørleggjarum og blikksmiðjum, sjálvur er hann skrivstovumaðurin, sum nú er stjóri á hesi familjufyritøku, ið hann er annað ættarliðið av.

Privat, so sæst hann í fjørðinum av og á og í grindadrápi er hann fúsur og hjálpsamur. Kristian er giftur Poulu Kristiansen úr Leirvík. Tey eiga trý børn.

**Jústinus**

# Telefar lækkar prísin á uttanlandssamrøðum

**Tíðindaskriv**
*Telefar*

Fyri fyrstu ferð síðani 1994 lækka felst øll uttanlands telegjøld hjá telefonfeløgum í Føroyum, ið nýta telesambandið GACB (Global Access CallBack).

Hetta er eisini galdandi til Danmarkar, har telegjaldið lækkar dag sum nátt niður í u. l. 1,40 kr um minuttin og 3 kr á fartelefon.

Við GACB eru eingi eykagjøld, so sum uppringingargjald upp á 40 oyru, hvørja ferð, vit fáa samband, sigur Telefar í tíðindaskrivi.

Avroknað verður yvir FR-Visa í dollarum, og heldur dollarin fram at falla, sum nú, er væl hugsandi, at hundraðtals GACB felagir í Føroyum í summar ringja á fastneti til Danmarkar fyri okkurt um eina krónu um minuttin.

| Telegjøld og sparing úr Føroyum (kr/min), galdandi frá 17-01-01 | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | GACB | Føroya Tele | Føroya Tele | Sparing | Sparing |
| Til | $=7.85 kr | fastnet | farnet GSM | fastnet | farnet |
| Danmark dag, | 1,40515 | 1,99 | 4,39 | 0,58485 | 2,98485 |
| Danmark nátt | 1,40515 | 1,65 | 3,05 | 0,24485 | 1,64485 |
| Danmark dag mob | 3,0458 | 3,99 | 6,39 | 0,9442 | 3,3442 |
| Danmark nátt mob | 3,0458 | 3,65 | 5,05 | 0,6042 | 2,0042 |


*Bergur Hanusson, djóralækni*


*Heri Joensen, prestur*


*Heri Kragesteen, sálarfrøðingur*


*Ingi Højgaard, løgfrøðingur*


*Jens Andreassen, lækni*


*Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur*


*Jón Klein Olsen, politistur*


*Jón Kragesteen. Ferðslutrygd*

# Spyrjið serfrøðingarnar

Adressan:
Sosialurin,
box 76,
110 Tórshavn,

Fax 314720
ella teldupost:
spyr@sosialurin.fo

– og merkið, hvørjum tit seta spurningum.

**Svarini verða prentað í blaðnum mikudag**


*Julianna Næs, pedagogur*


*Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi*


*Turid Thomsen, lestrarvegleiðari*


*Marius Staksberg, málfrøðingur*

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



# Fólk skulu ikki verða á biladekkinum



*Í síðstu viku koppaði stórur og tungur byngjubilur umborð á Dúgvuni, og slíkum óhappum eiga ferðafólk ikki at koma í nánd av, tí tey hava ikki loyvi at verða á biladekkinum, tá siglt verður*

**Strandferðslan ætlar sær ikki at broyta reglar umborð á Strandafaraskipinum, eftir at stórur byngjubilur koppaði umborð á Dúgvuni**

**TRYGD**
*Eyðun Klakstein*

Strandferðslan hevur ongar ætlanir um ikki at broyta reglur og mannagongdir umborð á Strandfaraskipunum eftir álvarsliga óhappið umborð á Dúgvuni í síðstu viku.

– Ferðafólk hava ikki loyvi at verða á bildekkinum, meðan skipini sigla, og tí eiga tey ikki at koma í nánd av slíkum óhappum, sum tá byngjubilurin koppaði, sigur Magnus Magnussen, sum er tekniskur leiðari á Strandferðsluni.

Heldur tú, at hetta verður hildið umborð á øllum skipunum?

– Vit siga í hvussu so er við manningarnar, at hesar reglur skulu haldast.

### Ikki fyrstu ferð

Tað var í illveðri í síðstu viku, at ein byngjubilur – fullur av fóðri – koppaði umborð á Dúgvuni. Bilurin vigaði millum 20 og 30 tons, og tí hevði talan verið um vanlukkuligt óhapp, um fólk var í vegin.

Eingin bilur stóð undir liðini á byngjubilinum, og tí var tað bara bilurin sjálvur, sum fekk skaða.

Í ringum veðri verða stóru bilarnir umborð á Dúgvuni festir við ketum, men hesaferð helt eitt festi á bilinum ikki, tá Dúgvan legði seg nógv.

Í fjør datt ein kassi av fiski úr einum bili umborð á Dúgvuni, og tá fekk bilur – sum tíbetur ikki varð mannaður – stóran skaða av óhappinum.

### Álit

Tekniski leiðarin á Strandferðsluni heldur, at tað er umráðandi, at bilar, sum flyta fisk ella fóður við Strandfaraskipinum, eru forsvarliga lastaðir.

– Men tað ber ikki til hjá manningini at kanna hvønn einstakan bil, sum kemur umborð á skipini, og tí er tað eisini ein spurningur um álit millum manningina og bilførarnar, sigur Magnus Magnussen.

Skiparin á Dúgvuni hevur skrivað eina frágreiðing um óhappið, og Strandferðslan ætlar sær at taka hana upp og læra av óhappinum, so tað hendir ikki aftur. Men í fyrstu syftu er ikki talan um at broyta reglur ella mannagongdir umborð á skipunum.

## Familjudagar í Nesvík



Í februar mánaði verða tvær familjulegur í húsunum hjá Heimamissiónini í Nesvík.

Fyrra legan verður vikuskiftið 16. til 18. februar, og tann seinna frá 23. til 25. februar.

Hugskotið við hesum legum er, at foreldur og børn kunnu bruka nakrar dagar saman á legu, har mangt og hvat er á skránni.

Tað ber til at melda seg til legurnar á tlf. 455286 áðrenn 10. februar.

## Hava hjúnadag á Toftum

24. februar verða sonevndir hjúnadagur í Tofta Missiónshúsi.

Tað eru føroyska deildin av AGAPE og Landsfamiljunevndin hjá Heimamissiónini, sum skipa fyri hesum degi.

Danski familjuviðgerðin Steen Palmquist verður gestarøðari, og hann fer millum annað at lýsa evnið »Maður og kona í Bíbliuni«.

Øll hjún kunnu luttaka á degnum, og tilmeldingarfreistin er sett til hálvan februar. Tilmelding kann gerast á 456785 og 448175.

# Nýggj salong í Klaksvík

**Vera Larsen hevur nú yviritikið salongina hjá Sólrun Olsen, sum tó heldur fram við yrkinum á nýggju salongini**

**HÁR**
*Eyðun Klakstein*


*Vera Klipt letur upp í dag, og talan er um rúmliga salong*

Í dag letur Vera Klipt upp í Klaksvík, og hóast talan er um nýggj høli og nýtt navn, hevur nýggja salongin samstundis tilknýti til Salong Sólrun, sum nú er afturlatin.

Vera Larsen, sum hevur starvast hjá Salon Sólrun, hevur yvirtikið salongina frá Sólrun Olsen, og í hesm sambandi er salongin flutt í nýggj høli á Vágsheygsgøtu.

Sólrun Olsen gevst tó á ongan hátt í fakinum, tí hon skal arbeiða á nýggju salongini, samstundis sum felagið Salong Sólrun hevur umboð upp á vørur frá Schwarzkopf, og hesari heilsølu skal Sólrun halda fram við.

### Móttøka í dag

Sólrun Olsen fór í læru sum frisør í 1960, og hon hevur arbeitt uttan íhald øll árini síðani.

Vera Larsen, sum yvirtekur salongina, fór í læru í 1986 og hevur starvast hjá Salong Sólrun.

Vera Klipt, sum nýggja salongin kallast, letur upp í dag, og í hesum sambandi er móttøka í nýggju hølunum. Tey ætla sær ikki at klippa í dag, men ístaðin geva fólki tíðir.

F R A M S Ý N I N G A R T I L B O Ð

SITI/ STANDIBORÐ



BORÐ AV BÓKATRÆ.

TRÝST Á EIN KNØTT OG BORÐIÐ LYFTIR SEG.

VÆL EGNAÐ TIL FUNDARBORÐ

ERGONOMISKT -TRYGGJAR VEKSLANDI ARBEIÐSSTØÐUR

KOSTNAÐUR EINANS
VIÐ GASSPUMPU 12.325 KRÓNUR
VIÐ EL-MOTORI 16.070 KRÓNUR
MVG ÍROKNAÐ

M Ó T T Ø K A

VIT LATA FRAMSÝNINGARHØLI VIÐ EFG SKRIVSTOVUMØBLUM UPP OG BJÓÐA ØLLUM ÁHUGAÐUM TIL MÓTTØKU Í DR. JACOBSENSGØTU 18 HÓSDAGIN 1. FEBRUAR MILLUM KLOKKAN 15 OG 18.

MUNIN
DR. JACOBSENSGØTA 18 · 100 TÓRSHAVN
TLF 35 36 00 · FAX 35 36 01 · MUNIN@MUNIN.FO
MUNIN ER EFG EINAUMBOÐ Í FØROYUM

VIT HAVA HUGIN OG GERA MUNIN